# Glasbúrið

eftir Sámal Soll

Arbeiðshefti til undirvísingarbrúk



# Innihaldsyvirlit

Soleiðis kann hetta heftið brúkast ... 3
Steðgistaðið ... 4
Petur Oluf Rasmusarson Norðvík ... 5
Úr søgubókini ... 6
Úti á eggini ... 7
Er nakar har? ... 8
Svart Hol ... 9
Ring boð ... 10
Ein sonn søga ... 11
Marrubókin ... 12
Bókabøðil ... 13
Ver ikki bangin ... 14
Glasbúrið ... 15
Eg og mítt spøkilsi ... 16
10 ára broytingin ... 17
Fríggjakvøld ... 18
Leygarkvøld ... 19
Gleðisdagur ... 20
Lívsgongd ... 21
Móðurkærleiki ... 22
At greina stuttsøgur ... 23
18 spurningar til rithøvundan ... 26
UMMÆLI: Glasbúrið sker ígjøgnum ... 30
Um rithøvundin ... 33

## Soleiðis kann hetta heftið brúkast

Hetta heftið við arbeiðsspurningum er ætlað lærarum og næmingum, sum vilja arbeiða við stuttsøgusavninum *Glasbúrið* í føroyskundirvísingini.

Heftið er skipað soleiðis, at spurningar og uppskot til kjakevni og atknýtt arbeiðsevni standa undir hvørjum søguheiti sær. Fyrst er uppskot til, hvat arbeiðast kann við, áðrenn søgan verður lisin, og síðani eru uppskot til spurningar og kjakevni, ið næmingar kunnu arbeiða við, eftir at søgan er lisin. Hetta heftið er hvørki fullfíggjað ella umboðandi eina ávísa "rætta" fatan av, hvussu søgurnar skulu skiljast, tí skaldskapur er altíð opin fyri øðrum tulkingarmøguleikum enn teimum, sum vit - í fyrstu atløgu - síggja. Somuleiðis kunnu summir spurningar og summi kjakevni tykjast at vera í so grunn, og aðrir spurningar og kjakevni í so djúp. Hetta er fyri at hava eina breidd, so arbeiðsheftið hevur okkurt til allar næmingar.

**Glasbúrið**

Glasbúrið er fyrsta stuttsøgusavnið eftir Sámal Soll, hóast hann hevur verið virkin rithøvundur í mong ár. Summar av søgunum í savninum hava staðið á prenti áður, meðan aðrar eru skrivaðar stutt undan útgávuni.  Í ummælinum "Glasbúrið sker ígjøgnum", sum Anna Poulsen og Rebekka Manuela Behrens skrivaðu fyri Röddina, ungdómspallin hjá KVF, stendur :

> "Stuttsøgusavnið er eitt nýbrot í føroyskum skaldskapi, tá talan er um skaldskap til ung. Hetta stuttsøgusavnið riggar. Tað er ikki ov yvirflatiskt ella óneyðuga "cheesy". Eisini dregur hann nútímans viðurskiftir inn, sum tú eisini lesur í enskum og donskum skaldskapi, men tó er tað serligt, at vit ungu kunnu lesa hetta, har vit samstundis hoyra um føroysk staðarnøvn."

Somuleiðis viðmerkti ummælarin Vónbjørt Vang í sjónvarpssendingini *Grindin* hóskvøldið 12. november í 2015, at savnið er "hart tiltrongt" í føroyskum skaldskapi, tí tað viðger evni, sum ung fólk halda vera spennandi og viðkomandi, og harumframt er málbúnin nútíðarhóskandi.

Eitt yvirlit yvir ummælir, og aðrar viðkomandi upplýsingar um savnið og rithøvundin, er á heimasíðu rithøvundsins: www.samalsoll.wordpress.com.

## Steðgistaðið

### Áðrenn tú lesur søguna

**Hugarok um heitið**

Skriva eitt hugarok um heitið á søguni “Steðgistaðið” í 5-10 minuttir. Hvat ímyndar tú tær, at hendan søgan fer at snúgva seg um. Hvat man hetta steðgistaðið vera?

### Eftir at tú hevur lisið søguna

**Tekstfatan. Rætt ella skeivt:**

Arbeiðið saman tvey og tvey. Skiftist um at spyrja hvønn annan hesar “rætt ella skeivt” spurningarnar.

1. Í byrjanini av søguni hevur kvinnan í steðgistaðnum eina sigarett og eina fartelefon í hondunum?
2. Høvuðspersónurin eitur Dan.
3. Hann hevur eina vespusamling.
4. Hann fer út í garasjuna at leita eftir eini peru.
5. Hann kennist ikki við kvinnuna.
6. Hann er vanur við at koyra í bussi.
7. Hann plagdi at koyra buss við ommu síni.
8. Í handlinum keypir hann ein gravstein.
9. Tá hann kemur heim aftur, sær hann konu sína liggja í songini.
10. Hann leggur gravsteinin frá sær í garasjuni.

**Greining**

1. Hvat er temað í stuttsøguni “Steðgistaðið”? Stuðla tínum svari við dømum úr tekstinum.
2. Eru persónarnir rundir ella flatir? Stuðla tínum svari við dømum úr tekstinum.
3. Í søguni eru støð og lutir, ið kunnu skiljast symbolskt, teirra millum: steðgistaðið, gravsteinurin og firvaldasamlingin. Greina symbolikkin í søguni.
4. Hvussu skilir tú endan á søguni.

**Kjak**

1. Í byrjanini av stuttsøguni “Steðgistaðið” tykist tað, sum hava vit við eitt parlag at gera, har maðurin er kúgaður av konuni. Hava menn, sum eru fyri harðskapi (kropsligum ella sálarligum) í parlagnum aðrar trupulleikar og avleiðingar av hesum enn konur, sum eru fyri sama harðskapi?

## Petur Oluf Rasmusarson Norðvík

### Áðrenn tú lesur søguna

**Lýs ein tráfylgjara (30 minuttir)**

1. Kjak í smáum bólkum (2-3 saman). Skrivið stikkorð niður.
2. Gerið ein stuttan lista yvir tey eyðkenni, sum ein tráfylgjari (ein, ið eltir (konu)fólk), hevur.
3. Hvussu sær ein tráfylgjari út? Greið í stuttum frá hansara barndómi. Hvat starv hevur hann? Hví ger hann tað, sum hann ger?
4. Leggið bólkaúrslitini fram fyri hinum í flokkinum.

### Eftir at tú hevur lisið søguna

**Tekstfatan**

1. Hvat ger Petur Oluf á torginum í SMS?
2. Hvussu ber Petur Oluf seg at at fáa tær upplýsingar, sum hann vil hava?
3. Hvør týðandi upplýsing um Petur Oluf verður avdúkað fyri lesaranum, tá hann fer inn í skrivstovuhúsið hjá SMS?
4. "Royndir høvdu lært hann, at tær einastu myndirnar, sum plagdu at vera áhugaverdar, vóru feriumyndir, ballmyndir og onkuntíð ítróttamyndir." (s. 21) Hví eru júst hesar myndirnar áhugaverdar?
5. Greið frá broytingini, sum hendir við kroppinum hjá Petur Olufi.
6. Greið frá endanum á søguni.

**Greining**

1. Ger eina persónslýsing av Petur Olufi Rasmusarson Norðvík. Hvat slag av høvuðspersóni er hann?
2. Hvussu skulu vit skilja kropsligu broytingina, sum hendir Petur Olufi? Skal hetta skiljast sum ein ítøkilig broyting?
3. Hvønn týdning hevur tað fyri søguna, at Petur Oluf er løgtingsmaður? (Samanberið við tykkara egnu lýsing av einum tráfylgjara, sum tit gjørdu, áðrenn tit lósu søguna).
4. Hvussu kann endin á søguni skiljast?

**Kjak**

1. Er tað vandamikið at leggja persónligar myndir á Facebook, Instagram og Snapchat?
2. Leggja vit ov nógvar upplýsingar um okkum sjálv á alnetið?
3. Vit hoyra um staðarnøvn og gøtunøvn í søguni. Á hvønn hátt ávirkar hetta tína uppliving av søguni samanborið við, um søgan gekk fyri seg aðrastaðni í heiminum?

# Úr søgubókini

## Áðrenn tú lesur søguna

**Skriva eina stutta stuttsøgu**

"Úr søgubókini" er ein stutt stuttsøga. Roynið tykkum við at skriva eina stutta stuttsøgu. Hon má ikki vera longri enn ein síða. Søgan skal hava byrjan, miðju og enda.

Tit kunnu skriva um júst tað, sum tit vilja. Tit kunnu eisini velja at skriva eina søgu, sum hevur **tveir** av hesum lutum í sær:

- eitt skáp við brotnari hurð
- eitt súrepli á einum kodda
- eina súkklu, sum er koppað á vegnum
- eitt gult stearinljós
- ein hvítan teldil

## Eftir at tú hevur lisið søguna

**Greining**

1. Met um huglagið í stuttsøguni. Finn dømir í søguni, sum stuðla tínum svari.
2. Temu í søguni kunnu vera kærleiki, aldursmunur ella sjúklig tráan (eftir einum persóni). Vel eitt tema og vís, hvussu tað kemur til sjóndar í søguni. Tú skalt brúka dømi úr tekstinum at stuðla tínum úrsliti.
3. Greið frá nýtsluni av afturliti í stuttsøguni.
4. Greið frá endanum á søguni.

**Kjak**

Í søguni verður greitt frá kærleika millum tvey, ið eru sera ymisk til aldurs. Kann man seta aldursmark á kærleika, ella kennir kærleiki ikki til aldur?

# Úti á eggini

## Áðrenn tú lesur søguna

**Hugarok**

1. Skriva eitt hugarok í 5-10 minuttir um evnið "ung og átrúnaður í Føroyum". Hvørji orð setir tú í samband við evnið?
2. Samanberið tykkara úrslit við úrslitini hjá hinum í flokkinum.

## Eftir at tú hevur lisið søguna

**Greining**

1. Sig frá tíð og staði í søguni.
2. Hvat er komið ímillum persónarnar?
3. Hví velur drongurin at gera tað, sum hann ger?

**Kjak**

1. Kann átrúnaður koma ímillum ung pør í Føroyum?
2. Søgan gongur fyri seg í Havn. Hevði hon eins væl kunna gingið fyri seg aðrastaðni í Føroyum?

# Er nakar har?

## Áðrenn tú lesur søguna

Stuttsøgan “Er nakar har” kann partvíst bólkast undir tekstslagið brævaskaldskapur. Í bókini *Hugtøk í bókmentafrøði* allýsir Turið Sigurðardóttir brævaskaldskap, sum: “...skaldskapur, har hendingagongdin burturav ella í høvuðsheitum er endurgivin í brævformi, vanliga gjøgnum brøv, sum ein persónur skrivar, men viðhvørt brøv hjá fleiri persónum.”

Serliga hava kendar ræðusøgur verið skrivaðar sum brævaskaldskapur t.d. *Frankenstein* eftir Mary Shelley og *Dracula* eftir Bram Stoker.

1. Skriva eina stutta stuttsøgu sum kjattsamskifti millum tveir ella fleiri kjattluttakarar. Evnið skal vera okkurt óhugnaligt.

## Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Skriva ein stuttan samandrátt av stuttsøguni (í mesta lagi 150 orð).
2. Kanna hvussu nógvir samskiftishættir og tekstsløg eru umboðað í stuttsøguni.
3. Hvønn týdning hevur tað fyri lesiupplivingina, at søgan ikki bert er skrivað í vanligari frásøgn?
4. Hví man rithøvundurin hava valt at skriva søguna á hendan hátt?
5. Být søguna upp í partar, og gev hvørjum parti eina yvirskrift.
6. Hvønn týdning hevur tað, at søgan telur niður til termin? Hvat merkir orðið?
7. Greina dreymalýsingina á s. 59 og 60. Fortelur dreymurin okkum nakað um søguna um Duritu?
8. Durita skrivar eina stuttsøgu um sítt egna lív. Hvørjir munir eru í søguni, sum hon skrivar og so søguni, sum vit lesa.
9. Hvat kunnu vit siga um teknsetingina í dreymalýsingini. Hví hevur rithøvundurin valt at skriva hetta brotið soleiðis?

**Kjak**

1. Høvuðspersónurin í “Er nakar har” skrivar eina stuttsøgu um sítt lív. Hví munnu summir rithøvundar skriva um sítt egna lív. Finn nøkur dømir um høvundar, sum gera tað.
2. Hvussu nógv temu eru í søguni? Vel eitt og finn brot í søguni, sum viðger hetta temað.

## Svart Hol

### Áðrenn tú lesur søguna

**Hugarok um heitið**

1. Skriva eitt hugarok um heitið á søguni “Svart Hol” í 5-10 minuttir. Hvat ímyndar tú tær, at hendan søgan fer at snúgva seg um. Hvat merkir heitið?
2. Samanberið tykkara úrslit.

### Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Greið frá umhvørvinum í stuttsøguni.
2. Ger viðmerkingar til hetta brotið: “Eg fekk mær eina sigarett úr pakkanum og leitaði spakuliga og drálandi í jakkalummanum eftir tendraranum.”
3. Hví er høvuðspersónurin glaður fyri, at einki er graverað á tendraran?
4. Lýs persónarnar.
5. Á s. 78-79 kemur orðið “at tora” fyri tvær ferðir í sambandi við Sandru. Sandra “tordi nógv betur, nú hon hevði lagt meira fjarstøðu til alt heima í Føroyum” og “hon tordi ikki so frægt sum at búgva í somu íbúð sum eg.” Hvat kann vera orsøkin til hetta?
6. Í stuttsøguni verður ein zippo-tendrari nógv umrøddur. Met um hvønn symbolskan týdning hesin hevur í søguni.
7. Lýs Edmund.
8. Greið frá endanum á søguni.

**Greining**

1. Hvat er temað í søguni? Vís á dømir í tekstinum, sum stuðla tínum svari.
2. Greina heitið á søguni (tú kanst lesa um svørt hol á føroysku Wikipediuni. Kann heitið sipa til nakað annað?
3. Amerikanski rithøvundurin Ernest Hemingway hevur orðað sonevnda ísfjall-ástøðið (The iceberg theory), sum sigur, at summar søgur kunnu skiljast sum ísfjøll, har bert 1/8 av søguni er skrivaður, tí 7/8 av søguni eru fjaldir undir vatnskorpuni. Hvat er fjalt undir vatnskorpuni í stuttsøguni “Svart Hol”?

**Kjak**

1. Stuttsøgan “Svart Hol” lýsir endan á einum parlagi. Hvørjar munnu vera tær vanligastu orsøkirnar til, at fólk gera tað liðugt við hvønn annan?
2. Sambært Hagstovu Føroya skiljast á leið helmingurin av teimum, sum giftast í Føroyum, aftur. Eru fólk ov skjót at gera tað liðugt?

## Ring boð

### Áðrenn tú lesur søguna

Stuttsøgan “Ring boð” er um ein mann, sum skrivar eitt illorðað bræv til ein fyrrverandi stjóra hjá sær. Høvuðspersónurin hevur ikki torað at sagt nakað beinleiðis við stjóran áður, men nú torir hann so at skriva tað til hansara.

Ímynda tær, at tú hevur verið í eini líknandi støðu. Onkur við valdi – tað kann vera ein stjóri, venjari ella lærari - hevur verið órættvísur ímóti tær, men tú segði einki um tað í støðuni.

1. Skriva eitt stutt bræv (hálv til heil síða) til viðkomandi, har tú “ikki leggur fingrarnar ímillum”.

### Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Høvuðspersónurin skrivar til ein, sum eitur T. Hví nýtir hann bert forbókstav og ikki fult navn?
2. Hvat er hent, áðrenn søgan byrjar? Hvat hevur brævaskrivarin verið úti fyri?
3. Hvat meinar brævaskrivarin, tá hann sigur“...at allar støður millum menniskju verða avgjørdar við valdi og hóttanini um harðskap.”
4. Ert tú samd/samdur í hesum? Hví ella hví ikki?
5. Í endanum av brævinum nevnir brævaskrivarin dóttrina hjá fyrrverandi stjóranum. Hevur hann burturflutt dóttrina ella ikki?
6. Met um boðskapin í stuttsøguni?
7. Hvussu er málið í søguni. Hví er tað so?

**Kjak**

1. Met um, hvørt brævaskrivarin hevur grein í sínum máli, tá hann skrivar: “Var hetta (*gølur og korruptión*) í Italia ella Spania ella okkurt av hasum londunum, so høvdu vit langt síðani farið út í gøturnar at barst við politiið og sett eld á bilar í Vaglinum.”
2. Høvuðspersónurin í søguni “Ring boð” er sannførdur um, at flest herverkstilburðir eru í Føroyum samanborið við onnur lond. Kanna um hagtøl finnast, sum stuðla hesum pástandi.
3. Heldur tú, at herverk er ein størri trupulleiki í Føroyum enn aðrastaðni? Hví ella hví ikki?
4. Hvat heldur tú, at høvuðspersónurin heldur átti at gjørt við trupulleikarnar í sínum lívi?

# Ein sonn søga

## Áðrenn tú lesur søguna

**Metafiktión**

Eitt eyðkenni (serliga) í postmodernistiskum skaldskapi er metafiktión. Hetta er skaldskapur, sum er greiður yvir sína støðu sum skaldskapur. Teksturin letst ikki vera ein avspegling av veruleikanum, men spælir sær heldur við mørkini millum fiktión og veruleika.

**Fyrireikandi gransking í matrixbólkum:**

1. Lærarin gevur hvørjum næmingi eitt tal millum 1 og 4, og flokkurin fer í 4 bólkar.
2. Eittararnir lesa um postmodernismu (í skaldskapi); tveyararnir lesa um metafiktón, tríararnir lesa um millumtekstasamband; og fýrararnir lesa um óálítandi frásøgufólk.
3. Bólkarnir kunnu lesa um evnini á netinum, m.a. í bókini *Hugtøk í bókmentafrøði* ella í donsku ella ensku Wikipediuni (20-30 minuttir).
4. Hvør næmingur fær síðani ein bókstav: A, Á, B, D, Ð. Nú skipa næmingarnir seg í hesar nýggju bólkarnar og skiftast um at leggja síni úrslit fram fyri hvørjum øðrum. Eittararnir byrja.

## Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Hví man høvundurin nevna fleiri hendingar og árstal í byrjanini av søguni?
2. Hvussu vilt tú lýsa heitið á søguni?
3. Vís á tey støð í søguni, har frásøgnin verður brotin av øðrum røddum og søgubrotum.
4. Finn brot, ið vísa, at søgan er greið yvir, at hon er fiktión.
5. Lýs frásøgufólkið. Eru fleiri frásøgufólk?
6. Hví man rithøvundurin brúka sítt egna navn í søguni?
7. Hvat er trupulleikin við endanum á søguni?

**Kjak**

1. Ber tað til at greina slíkar eksperimenterandi søgur á sama hátt, sum vit greina siðbundnar stuttsøgur?
2. Er ein boðskapur í stuttsøguni “Ein sonn søga”?
3. Í stuttsøguni eru fleiri poppmentanarligar tilsipingar og eisini dømi um “name-dropping”. Eru hesar tilsipingar týdningarmiklar ábendingar um tulkingarmøguleikar ella falskar slóðir?

# Marrubókin

## Áðrenn tú lesur søguna

Klippilist og dreymar/marrur eru evni í stuttsøguni "Marrubókin". Kendasta føroyska listafólkið, sum hevur arbeitt við klippilist er óivað William Heinesen, hóast fleiri onnur hava roynt seg við hesum. Permumyndin á savninum *Glasbúrið* er ikki klippilist sum so, men klippilist er evnið í tekningini.

1. Greina og tulka permumyndina, sum danska listakvinnan Tatiana Goldberg hevur teknað til stuttsøgusavnið.
2. Listakvinnan hevur teknað permumyndina við íblástri frá stuttsøguni "Marrubókin". Skriva nakrar tankar niður um, hvat tú væntar, at stuttsøgan fer at vera um. Hygg væl og gjølla at myndini og skriva so umleið eina hálva síðu uttan at steðga. Hvat fer "Marrubókin" at snúgva seg um?

## Eftir at tú hevur lisið søguna

**Greining**

1. Lýs umhvørvið í fyrsta broti í søguni (s. 99-100).
2. Hví man frásøgufólkið siga "orsaka" á s. 100?
3. Hvussu er huglagið í fyrstu síðunum í søguni?
4. Hvussu verður kvinnan á s. 101 lýst?
5. Er nakar serligur týdningur í nøvnunum hjá persónunum í søguni?
6. Hvat hendir við frásøgufólkinum, tá konan vísir honum runt í húsunum?
7. Hvat hendir við kvinnuni í húsunum?
8. "Hesi húsini eru sum ein bók," sigur konan. Hvussu kunnu bøkur og saksar lesast sum symbol í søguni?
9. Greið frá sjónarhorninum í søguni.
10. Hvussu kann endin á søguni tulkast?
11. Hevur stuttsøgan ein boðskap?

**Kjak**

Sigmund Freud skrivaði í 1900 eina bók um dreymatulking (á týskum: Die Traumdeutung), har hann skrivar, at okkara undirvitska roynir at greiða okkara óttar og traumur í dreymum, tí tá sleppur undirvitskan framat og er ikki hildin niðri av okkara vakna tilviti.

1. Hevur Freud grein í sínum máli? Hvat eru dreymar, og hví hava vit onkuntíð marrur?

# Bókabøðil

## Áðrenn tú lesur søguna

Stuttsøgan "Bókabøðil" er um ein rithøvund, sum ummælararnir ákæra fyri at vera hópdrápsmann, tí hann hevur skrivað eina bók um ein hópdrápsmann.

1. Hyggið at fyrsta parti av amerikansku sjónvarpsrøðini *Dexter* frá 2006.
2. Lýs høvuðspersónin.
3. Kundi tú ímynda tær eina slíka søgu í Føroyum?

## Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Hvat ger høvuðspersónurin í byrjanini á søguni?
2. Hví nevnir høvundurin litin á penninum, sum høvuðspersónurin brúkar til at skriva sítt lesarabræv við?
3. Greið frá, hvat tað er, sum fær høvuðspersónin til at skriva lesarabrævið. Hvat er farið fram, áðrenn søgan byrjar?
4. Lýs høvuðspersónin soleiðis, sum hann kemur til sjóndar í lesarabrævinum.
5. Hvør er boðskapurin í lesarabrævinum, sum høvuðspersónurin skrivar?
6. Hvat merkir heitið á skaldsøguni hjá høvuðspersóninum *Blóðglaður*?
7. Hvat merkir heitið á stuttsøguni "Bókabøðil".
8. Hvussu fær heitið ein breiðari týdning í síðsta parti av stuttsøguni?
9. Stuttsøgan endar við einum plott-tvisti. Hvussu broytir hetta okkara fatan av tí, sum varð nevnt í lesarabrævinum í brotinum frammanundan?
10. Ber til at finna ábendingar um plott-tvistið, um man lesur stuttsøguna umaftur?

**Kjak**

1. Eydnast tað høvundinum at lumpa lesaran ígjøgnum søguna, soleiðis at lesarin gerst kløkkur av plott-tvistinum?
2. Hevur høvuðspersónurin grein í sínum máli, tá hann sigur, at "teir bestu rithøvundarnir og bestu listafólkini ikki verða virðismett í livitíð síni"?
3. Høvuðspersónurin rør upp undir, at føroyingar ikki duga at lesa skaldskap, tí tey lesa bøkurnar biografiskt. Tey halda, at skaldskapurin er um verulig fólk og sostatt ikki er fiktión. Er hetta rætt?

# Ver ikki bangin

## Áðrenn tú lesur søguna

**Føroyskar spøkilsissøgur**

Stuttsøgan "Ver ikki bangin" varð upprunaliga prentað í einum norðurlendskum savni við spøkilsissøgum úr Føroyum, Danmark, Svøríki, Íslandi, Noregi, Grønlandi, Finnlandi og Sámalandi. Savnið eitur "Spøkilsið sum flenti" og tað kom út á hasum 8 málunum. Endamálið við savninum var at skriva nýggjar spøkilsissøgur, sum kortini bygdu á serliga frásøgusiðin í teimum ymisku londunum.

1. Hvørji eyðkenni heldur tú, at føroyskar spøkilsissøgur hava? Arbeiðið saman tvey og tvey og skrivið nøkur stikkorð niður.
2. Samanberið tykkara úrslit við úrsltini hjá hinum í flokkinum.
3. Lærarin skrivar tey vanligastu eyðkennini á talvuna.

## Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Hvussu skapar høvundurin huglagið í byrjanini í søguni.
2. Lýs Jóhonnu og Hannu-ommu.
3. Hvussu langa tíð fevnir søgan um?
4. Greina heitið á søguni.
5. Er nakar boðskapur í søguni?
6. Greið frá sjónarhorninum í søguni.
7. Hvørjar ábendingar vóru í søguni um "plott-tvistið", sum kom í endanum?

Kjak

1. Á hvønn hátt kann hendan søgan samanberast við hinar í savninum?
2. Met um, hvør málbólkurin hjá søguni er.
3. Hyggið at filminum *The Others* ella *The 6th Sense* og samanberið við "Ver ikki bangin".

## Glasbúrið

### Áðrenn tú lesur søguna

Hyggið í føroyskbókina *Sýni og dýpi 1*: https://sd1.sbok.nam.fo/?id=c1408

1. Hyggið at samrøðuni við rithøvundan, har hann greiðir frá hugskotinum til "Glasbúrið".

**Fyrireikandi gransking í matrixbólkum:**

1. Lærarin gevur hvørjum næmingi eitt tal millum 1 og 4, og flokkurin fer í 4 bólkar.
2. Eittararnir lesa um dystopi; tveyararnir lesa um totalitarismu, tríararnir lesa um fasismu; og fýrararnir lesa um George Orwell og bókina *1984*.
3. Bólkarnir kunnu lesa um evnini á netinum, m.a. í donsku ella ensku Wikipediuni (20-30 minuttir).
4. Hvør næmingur fær síðani ein bókstav: A, Á, B, D, Đ. Nú skipa næmingarnir seg í hesar nýggju bólkarnar og skiftast um at leggja síni úrslit fram fyri hvørjum øðrum. Eittararnir byrja.

Hyggið aftur í føroyskbókina *Sýni og dýpi 1*.

1. Lurtið eftir søguni.

### Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Lýs drongin og hvussu hann upplivir avrættanina.
2. Lýs Borgarstjóran og framferðarhátt hansara í samband við avrættanina.
3. Hví man tað vera eitt glasbúr, sum Fangin verður settur í?
4. Hvussu verður samfelagið lýst í søguni? Hvørji virði verður dentur lagdur á?
5. Tulka myndamálið í søguni.
6. Hví stavar høvundurin navnleysu persónarnir við stórum forbókstavi: Mamman, Drongurin, Fangin, o.s.fr.
7. Hví eitur søgan "Glasbúrið"?
8. Lýs tema og boðskap í søguni.

**Kjak**

1. Hvørjar søgur ella filmar kanst tú samanbera "Glasbúrið" við? Greið frá líkleikum og ymiskleikum.

# Eg og mítt spøkilsi

## Áðrenn tú lesur søguna

**Hugarok um heitið**

1. Skriva eitt hugarok um heitið á søguni “Eg og mítt spøkilsi” í 5-10 minuttir. Hvat ímyndar tú tær, at hendan søgan fer at snúgva seg um.
2. Samanberið tykkara úrslit við úrslitini hjá hinum í flokkinum.

## Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Lýs umhvørvið í søguni. Hvar gongur hon fyri seg?
2. Hvat fáa vit at vita um spøkilsið?
3. Hví man frásøgufólkið finna lepan, sum tað hongdi á hurðina hjá spøkilsinum, á síni egnu hurð morgunin eftir.
4. Greina endan á søguni.
5. Hvussu skulu vit skilja “plott-tvistið” í endanum á søguni?
6. Hvørjar ábendingar vóru í søguni um “plott-tvistið”, sum kom í endanum?
7. Kanst tú samanbera søguna á nakran hátt við hinar søgurnar í savninum?

**Kjak**

Í føroyskum er siðvenja at nevna teg sjálvan síðst, tá tú nevnir okkurt umframt teg sjálva/n, tí kann sigast, at heitið á søguni kanska heldur átti at verið “Mítt spøkilsi og eg.”

1. Hví hevur høvundurin kortini valt tað heitið, sum hann hevur valt, til søguna?
2. Hvussu gert tú? Nevnir tú teg sjálva/n síðst, tá tú nevnir okkurt umframt teg sjálva/n?

# 10 ára broytingin

## Áðrenn tú lesur søguna

Ímynda tær, at tú hittir ein gamlan floksfelaga (av hinum kyninum), sum tú ikki hevur sæð, síðani tit vórðu liðug í skúlanum fyri 10 árum síðani. Tit fara inn í eina kaffistovu og práta um alt tað, sum er hent hesi 10 árini.

1. Skriva eina stutta stuttsøgu um tað, sum hesi bæði – floksfelagarnir – tosa um. Minst til at gera søguna áhugaverda og spennandi.

## Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Stuttsøgan byrjar mitt í eini samrøðu – in medias res. Hvørja ávirkan hevur tað á lesiupplivingina?
2. Hví lýgur Frank á s. 126 – tvær ferðir.
3. Royn og endurskapa - út frá upplýsingunum í søguni – lívið, sum tey bæði høvdu saman fyri 10 árum síðani.
4. Hvat verður avdúkað um Frank í endanum á søguni?
5. Hvørjar ábendingar vóru í søguni um "plott-tvistið", sum kom í endanum?
6. Er ein boðskapur í søguni?
7. Eru persónarnir í stuttsøguni flatir, rundir, dynamiskir ella statiskir?

**Kjak**

1. Hyggið at øllum ella pørtum av sendingunum "Av hinum slagnum – útlegdin" og "Av hinum slagnum – glíðibreytin" um søguna hjá samkyndum í Føroyum.
2. Vitjið www.lgbt.fo og síggið m.a. yvirlit yvir føroyskar bøkur, søgur og sangir, sum viðgera samkyndleika.
3. Stuttsøgan "10 ára broytingin" var fyrstu ferð prentað í 2001, mong ár áðrenn LGBT Føroyar varð stovnað. Hvussu hevur støðan hjá samkyndum í Føroyum verið tá samanborið við í dag? Hvussu var almenni hugburðurin til samkynd tá?

# Fríggjakvøld

## Áðrenn tú lesur søguna

**Kyn**

Les ummælini, sum bókin hevur fingið. Eitt ummæli er prentað aftast í hesum hefti, og hini kunnu lesast og síggjast á heimasíðu rithøvundans www.samalsoll.wordpress.com. Kanna hvat ummælararnir siga um kyn og kynsleiklutir í stuttsøgunum. Arbeiðið saman í bólkum og skrivið niður stikkorð um alt, sum tit koma fram á, sum hevur við kyn at gera. Hvussu viðger høvundurin kvinnur og menn sambært ummælarum?

## Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Lýs samrøðuna, sum stuttsøgan byrjar við. Hvat tosa tey um og hví?
2. Niðast á s. 129 hugsar høvuðspersónurin: "Hetta er ein avgerandi løta beint nú." Hvat meinar hann við?
3. Ger persónslýsing av teimum báðum monnunum í søguni. Hvussu eru teir ymiskir?
4. Hvussu er samrøðan, sum gentan hevur við mannin, sum líkist Jason Statham mitt á s. 130, øðrvísi enn samrøðan, sum gentan og høvuðspersónurin hava í byrjanini á søguni.
5. Hví fer drongurin frá borðinum við gentuni og manninum, sum júst hevur sett seg?
6. Hvat sipar drongurin til, tá hann tosar við barrvørðin á s. 131 og sigur: "Eg veit ikki, hvør eg skal vera. Tað havi eg ongantíð vitað."
7. Grein sjónarhornið í søguni.
8. Hvat fáa vit at vita frá barrvørðinum um mannin, sum líkist Jason Statham?
9. Hví man drongurin siga "Orsaka, mamma," tá hann verður lagdur í song?
10. Eru persónarnir í stuttsøguni flatir, rundir, dynamiskir ella statiskir?

**Kjak**

1. Ungi drongurin í stuttsøguni hevur trupulleikar við at fáa damuna og endar við at drekka alt ov nógv í staðin. Er alkohol ein fyrimunur ella vansi, tá man skal skora í býnum? Hví?
2. Hvussu er "ballingarmentanin" í Føroyum samanborið við í øðrum londum? Nær fer man í býin, hvussu eru støðini, og hvussu nógv drekkur man?
3. Skrivlig uppgáva: Ímynda tær, at tú ert ein amerikanskur skiftisnæmingur í Føroyum, og tú skalt skriva ein teldupost til vinfólk tíni heima í USA. Tú sigur teimum frá einum býtúri (t.d. í Havn ella aðrastaðni í landinum) og greiðir teimum frá, hvussu tað gekk fyri seg.

# Leygarkvøld

## Áðrenn tú lesur søguna

Eins og stuttsøgan frammanundan – "Fríggjakvøld" – er stuttsøgan "Leygarkvøld" eisini um ein ungan mann, sum fer í býin fyri at ballast og skora.

1. Í hvussu stóran mun metir tú, at hetta evnið er viðgjørt í føroyskum skaldskapi samanborið við útlendskan. Kanna t.d. skaldskapin hjá Magnusi Dam Jacobsen, Jóanesi Nielsen og Hanusi Samró.
2. Átti tað at verið viðgjørt meira/minni? Hví?

## Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Lýs ballið, sum høvuðspersónurin kemur til. Fáa vit nakað at vita um tað?
2. Ger persónslýsingar av teimum báðum persónunum. Eru persónarnir í stuttsøguni flatir, rundir, dynamiskir ella statiskir?
3. Met um, hvørt høvuðspersónurin í "Leygarkvøld" er tann sami sum í "Fríggjakvøld". Á hvønn hátt eru teir eins ella ymiskir?
4. Hvussu er við kynshugburðinum, sum kemur til sjóndar í hesum søgum. Hvør skorar, og hvør verður skorað/ur?
5. Samanber søguna við "Fríggjakvøld" á aðrar mátar?
6. Er søgan trúverdug? Lýsir hon eina sannlíka hending eitt leygarkvøld?
7. Kann man hugsa sær, at tey bæði fara at hava eitt seriøst parlag í framtíðini? Hví? Hví ikki?

**Kjak**

1. Bæði "Fríggjakvøld" og "Leygarkvøld" eru skrivaðar frá einum mannfólkasjónarhorni, men á hvønn hátt viðgera tær royndirnar hjá unga manninum at skora í býnum ymiskt?
2. Skrivlig uppgáva: Skrivið stuttsøguna "Leygarkvøld" umaftur, men út frá sjónarhorninum hjá gentuni hesaferð.

# Gleðisdagur

## Áðrenn tú lesur søguna

**Hugarok um heitið**

1. Skriva eitt hugarok um heitið á søguni “Gleðisdagur” í 5-10 minuttir. Hvat ímyndar tú tær, at hendan søgan fer at snúgva seg um. Hvat er ein gleðisdagur?
2. Samanberið tykkara úrslit við úrslitini hjá hinum í flokkinum.

## Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Hvussu lýsir frásøgufólkið útsjónd – sína og ta hjá gentuni – í søguni?
2. Ger persónslýsingar av teimum báðum persónunum. Eru persónarnir í stuttsøguni flatir, rundir, dynamiskir ella statiskir?
3. Lýs samrøðuna millum tey bæði í søguni.
4. Hvussu langt tíðarskeið fevnir søgan um?
5. “Um 100 ár eru vit øll deyð kortini” sigur frásøgufólkið einaferð. Hvat meinar hann við?
6. Samanber søguna við tær báðar undanfarnu: “Fríggjakvøld” og “Leygarkvøld”.

**Kjak**

Eitt tema, sum gongur aftur í teimum trimum søgunum “Fríggjakvøld”, “Leygarkvøld” og “Gleðisdagur” kann sigast at vera “Carpe Diem.” Heldur tú, at tað ber til at liva lívið eftir hesi leiðreglu?

# Lívsgongd

## Áðrenn tú lesur søguna

**Fantasy**

Sveim ella furðusøgur nevna vit sjangruna fantasy á føroyskum. Les um hugtakið á netinum m.a. í donsku ella ensku Wikipediuni (10-15 minuttir).

## Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Stuttsøgan byrjar mitt í einum setningi. Hvussu ávirkar tað lesiupplivingina?
2. Hvat fáa vit at vita um frásøgufólkið?
3. Hvat fáa vit at vita um umhvørvið?
4. Lýs standmyndirnar, sum frásøgufólkið kemur fram á.
5. Hví eitur søgan "Lívsgongd"?
6. Greina symbolikkin í søguni.
7. Hvat man vera farið fram, áðrenn søgan byrjar?

**Kjak**

Skrivlig uppgáva: Vit ímynda okkum, at søgan "Lívsgongd" er fyrsti kapittul í eini langari fantasy skaldsøgu. Skriva annan kapittul.

## Móðurkærleiki

# Áðrenn tú lesur søguna

**Horror**

Stuttsøgan "Móðurkærleiki" kann flokkast undir sjangruni horror ella ræðusøgur.

1. Skriva ein lista yvir 5 tær óhugnaligastu horror-søgurnar ella filmarnar, sum tú hevur lisið ella sæð.
2. Royn og skriva niður, hvat tað er, sum ger júst hesar søgur óhugnaligar (15-20 minuttir tilsamans).

# Eftir at tú hevur lisið søguna

1. Hví er søgan býtt í smáar partar við hvør sínum tali? Hvørja ávirkan hevur hetta á lesingina?
2. Millumtekstasamband er millum hesa stuttsøguna og aðrar stuttsøgur í savninum. Hvussu eru tær atknýttar, og hvørjar eru tær?
3. Upprunaliga heitið á søguni var "Móður kærleiki". Hvat er munurin á hesum heitinum og so tí, sum søgan nú hevur? Hvussu viðvíkur hetta søguni?

**Kjak**

1. Hvussu er tín meting av søguni? Hevur hon ein boðskap?
2. Met um dygdina hjá tekstinum, tá hugsað verður um mál, evni o.a.

## At greina stuttsøgur

Stuttsøgur eru – sum orðið sigur – stuttar søgur, sum vanliga bert hava eina søgugongd og fara ikki í dýpdina við fleiri persónum ella fleiri søgugongdum, soleiðis sum vit kenna tað frá eitt nú skaldsøgum. Í stuttsøgum eru vanliga fáir persónar, og oftast eru teir knýttir at sama umhvørvi. Vanliga umrøða stuttsøgur eitt høvuðstema (hóast fleiri smærri evnir stundum verða umrødd) og tær fevna sjáldan um eitt langt tíðarskeið.

**Hvussu greina vit**

At greina einhvønn tekst er í høvuðsheitum at seta tekstinum spurningar. Við hesum spurningum skilir man tekstin sundur fyri at kanna smálutirnar í honum og fyri at skilja, hvussu hann riggar. Ikki allir spurningar eru eins viðkomandi til hvønn tekst ella hvørja stuttsøgu, tí eru spurningarnir her bert ætlaðir sum íblástur til, hvussu vit kunnu koma fram at teimum týðandi lutunum í teimum einstøku søgunum. Tað er stuttsøgan sjálv, sum ger av, hvørjir spurningar skulu brúkast til at greina hana.

At greina er at spyrja, og tey svarini, sum vit fáa, eru bert áhugaverd, um tey hjálpa okkum at skilja, hvussu stuttsøgan riggar, og sostatt eisini, hvussu hon ávirkar okkum, sum lesa hana.

Tískil lýsa vit ikki smálutir í tekstinum uttan eisini at greiða frá, hvat teirra endamál er.

**Staðfesting av tekstslagi (stuttsøga)**

- Stuttur prosatekstur – við byrjan, miðju og enda
- Ein søgugongd, ikki fleiri
- Fáir persónar í støðuni
- Stutt tíð
- Avmarkað umhvørvi

**Samandráttur av søguni**

Tað kann vera hent at byrja við at gera ein stuttan samandrátt av stuttsøguni. Tú skalt royna at endurfortelja teir mest týðandi partarnar av søguni við tínum egnu orðum, og tá skalt tú minnast til at fáa teir smálutir við, sum eru viðkomandi í tíni greining av søguni. Ein samandráttur skal altíð vera stuttur, tí má einki óviðkomandi koma við.

**Heiti**

- Hvat merkir heitið?
- Hóskar tað til søguna?

**Tíð**

- Hvussu long er tíðin í søguni (søgutíðin)
- Hvørjari søguligari tíð gongur søgan fyri seg í?

**Umhvørvi**

- Hvar gongur søgan fyri seg?
- Hvussu verður umhvørvið lýst?
- Eru persónslýsingarnar uttanveltaðar (neutralar) ella viðmerkjandi/litaðar?

**Persónar**

- Hvørjir eru høvuðspersónar, og hvørjir eru eykapersónar?
- Hvussu eru persónarnir lýstir? (Aldur, útsjónd, eginleikar, atferð, meiningar, hvussu síggja tey onnur, o.s.fr.).
- Verða persónarnir lýstir beinleiðis (av frásøgufólkinum)?
- Ella (og) verða persónarnir lýstir óbeinleiðis umvegis gerðir, útsagnir og hugsanir teirra?
- Hava teir bæði góðar og ringar síður?
- Eru persónarnir flatir ella rundir? (Meira um hetta longri niðri*).
- Eru persónar, sum eru mótsetningar? Lýs, hvussu teir eru tað.
- Broytast summir persónar í søguni? Lýs hvussu.
- Eru summir persónar, sum ikki broytast? Hví?
- Bólka persónar sum annaðhvørt góðir ella ringir, soleiðis sum teir verða lýstir í tekstinum.

**Frásøgufólk og sjónarhorn**

- 1. persónur / 3. persónur / alvitandi / avmarkað / opið

**Slag av frásøgn**

- Einarøða / samtala / óbeinleiðis tala / tankar
- Lýsandi tekstur (lítið ítøkiligt hendir)
- Virkin tekstur (nógv ítøkiligt hendir)

**Bygnaður**

- Hvussu er tekstur bygdur?
- Sveiggjar spenningsmyndin, ella er hon bein?
- Brúkar søgan afturlit?
- Er søgan ein ringrás?
- Er endin opin ella afturlatin?

**Málið**

- Hvussu er málið? Hátíðarligt / talumál / fremmandaorð / banniorð / dialekt / slang / orðaspøl.
- Er myndamál í stuttsøguni?

**Tema - boðskapur**

- Verður ein ávísur trupulleiki ella evni viðgjørt í stuttsøguni?
- Tosa yvirskipað um evnið uttan at taka persónarnar fram.
- Hvørji týðandi virðir koma fram í søguni?
- Hví verða júst hesi evni tikin fram í søguni?
- Hevur teksturin ein boðskap?

**Sendari – móttakari**

- Hvør er sendarin?
- Hvørjum er søgan ætlað (móttakari)?

**Samanbering**

- Samanber søguna við aðrar søgur í sama savni.
- Samanber søguna við aðrar søgur / tekstir.
- Hvussu viðger hendan søgan sítt tema samanborið við aðrar søgur, filmar, leikir o.a., sum eisini viðgera sama tema?
- Samanber søguna við aktuell evni.

**Tín meting av søguni**

- Er boðskapurin viðkomandi?
- Kanst tú brúka hann til nakað?
- Met um dygdina hjá tekstinum, tá hugsað verður um mál, lýsingar o.a.

*

Rundir persónar: Ein rundur persónur er ein, ið hevur eina samansetta persónmensku. Hesir persónar hava ofta mótstríðandi síður í síni persónmensku.

Flatir persónar: eru tað øvuta av rundum persónum. Hesir eru grunnir og hava lítla og onga persónmensku. Hesir persónar eru meira at kalla typur enn einstaklingar.

Dynamiskir persónar: ein dynamiskur persónur er ein, ið broytist yvir tíð, vanliga eftir eina týðandi konflikt ella sum úrslit av einhvørjari kreppu. Flestu dynamisku persónar eru ofta høvuðspersónar, tí mangan er tað so, at høvuðspersónurin skal megna at klára seg í einhvørjari kreppustøðu.

Statiskir persónar: Ein statiskur persónur er ein, sum ikki broytist yvir tíð. Hansara persónmenska er óbroytt og mennist ikki.

## 18 spurningar til rithøvundan

1. Hvaðani fært tú íblástur?

Íblásturin kemur altíð frá óvæntaðum støðum. Og íblástur kann koma allastaðni frá. Ofta kemur hann frá filmum og øðrum søgum og bókum, og onkuntíð kemur hann frá onkrum, sum eg hoyri fólk tosa um. Onkuntíð kemur hann frá onkrum, sum eg havi upplivað sjálvur. Men tað er umráðandi, at ein rithøvundur er opin fyri íblástri, og tað merkir, at man skal vera forvitin og spyrja nógv. Man skal lesa nógv og fylla alt møguligt í høvdið á sær. Man veit ikki, hvat man fær brúk fyri.

2. Er nakar ávísur rithøvundur, sum gevur tær íblástur at skriva?

Tað er ein long røð av rithøvundum, sum hava givið mær íblástur at skriva. Eg las altíð óvanliga nógv samanborið við vinfólk, haldi eg, eitt nú í framhaldsdeildini, og tá eg gekk í Hoydølum. Tað byrjaði við ungdómsbókum og klassisku ævintýrsøgunum hjá Jules Verne. Fyrst á donskum, men so við og við á enskum. So dámdi mær detektivsøgur og eg las alt hjá Agathu Christie. Eg varð eisini púra burtur í bókunum hjá Stephen King og Dean R. Koontz. Hetta var alt sovorðið, sum eg las av egnum áhuga, men ígjøgnum skúlan kom eg eisini at lesa ymiskt, sum verður mett at vera meira seriøsar bøkur. Í Hoydølum høvdu vit nakrar stuttsøgur hjá Ernest Hemingway í enskum, og eg varð hugtikin serliga av skrivistílinum, um ikki altíð av evnunum. So fór eg at lesa enskt og enskar og amerikanskar bókmentir á universiteti, og tá las eg einar 3 skaldsøgur um vikuna, alt á enskum og um alt møguligt. Vilt tú vera rithøvundur, so mást tú – umframt at skriva – lesa sera nógv.

3. Hvat hugtekur teg við horror- ella thriller sjangrunum, sum tú brúkar í savninum?

Mær dámar sera væl at arbeiða við sjangrum. Tað er nakað við, at man kann lættari stýra lesarunum, tí fólk, sum eru von við at lesa ella síggja filmar í ávísum sjangrum hava eina vitan um, hvussu sovorðnar søgur eiga at vera. Tí kann man kløkka lesaran við at bróta reglurnar, sum annars eyðkenna ávísar sjangrur. Mær dámar væl at seta ymisk bókmentatekstsløg saman og blanda lættisopp og "alvorligt" saman.

4. Hví valdi tú at geva søgurnar út?

Eg havi altíð viljað givið út. Tað hevur onkursvegna altíð verið ein stórur partur av endamálinum. Tá eg skrivaði mínar fyrstu stuttsøgur, plagdi eg altíð at vísa fólkum søgurnar, og tað virkaði sum um teimum dámdi tær væl. So sendi eg tríggjar søgur inn til eina stuttsøgukapping, sum Dimmalætting skipaði fyri, og hóast eg ikki vann, vóru allar tríggjar millum níggju tær bestu, sum komu út í bók. Eg haldi, at hetta fortaldi mær, at eg dugdi nóg væl at finna uppá søgur, sum fólk vilja og tíma at lesa. Men tað tók langa tíð at geva út, tí lívið hevur eisini annað innihald enn skriving.

5. Hvat er við samfelagnum, sum provokerar teg (t.d. “Bókabøðil”, “Ring boð” og “PORN”)?

Eg haldi ikki, at tað er so nógv sum provokerar meg beinleiðis, men eg uppfangi ymiskt í samfelagnum, og so fær tað lív í einum persóni í einari søgu. Tað er rætt, at persónarnir í t.d. “Bókabøðil” og “Ring boð” eru illir inn á ymiskt í samfelagnum og kritisera føroyingar og føroyska samfelagið. Men tað, sum hugtekur meg meira er, hvat fólk velja at gera við tað, sum provokerar tey í samfelagnum, ella rættari sagt, hvat tey velja ikki at gera. Serliga “Ring boð” er eitt dømi um hetta. Høvuðspersónurin er illur um gongdina í samfelagnum og um ymiskt, sum hann persónliga hevur verið úti fyri, men hann dugir ikki at gera nakað skilagott fyri at loysa hetta. Tað er bara impotent vreiði, sum endar við eini hóttan ímóti barninum hjá tí, sum hann fyrst og fremst er illur við. Hann sigur tað sjálvur, at í øðrum londum gera fólk ordiliga uppreistur, tá okkurt órættvíst verður staðfest í samfelagnum, meðan vit í Føroyum vita ikki, hvussu man skal gera. Eg skrivaði hasa søguna stutt eftir eitt av mótmælunum á Vaglinum ímóti politikkinum hjá undanfarnu samgongu. Fólk vóru ill, men fóru síðani heim hvør til sítt at skeldast á Facebook heldur enn at gera nakað við støðuna.

6. Er tað tilvild, at søgan eitur “Petur Oluf Rasmusarson Norðvík” (“PORN”)?

Nei, tað er ikki tilvild. Hatta er ein fjald ábending um veruligu náttúruna í manninum. Hann umboðar nokk eina serliga fatan, eg havi av summum konservativum, religiøsum politikarum, sum eitt nú eru ímóti at geva samkyndum javnrætt. Eg havi ofta hugsað soleiðis, at tað eru hesir, sum eru teir veruligu perversu, tí teir eru so besettir av hesum málinum. Flest onnur hava eina størri javnvág í áhuga- og hjartamálum. Tað fær meg altíð at hugsa, hvat liggur undir vatnskorpuni hjá hesum politikarum, sum eru so ídnir at fortelja okkum, hvat er normalt og ikki. “Tað, sum man sigur um hini, er man sjálvur” plaga døtur mínar at minna meg á.

7. Hví eru kvinnurnar í søguni altíð lýstar út frá útsjónd og sum sexobjekt?

Flestu søgurnar eru uttan iva fortaldar úr einum maskulinum – og summar mannsjauvinistiskum – sjónarhorni. Hetta er partvíst, tí fleiri eru skrivaðar, tá eg var yngri og hugsaði nógv um at fara í býin í vikuskiftinum og skora. Tær søgurnar eru fortaldar úr sjónarhorninum hjá ungum dreingjum. Eitt undantak, vóni eg, er søgan “Er nakar har?”. Hon er søgd úr einum kvinnuligum sjónarhorni, hóast tann kvinnan eisini gerst offur fyri einum manni.

8. Er nøkur søga bygd á veruleikan ella persónligar upplivingar?

Nei, ikki sum so, men har er fult av veruligum hendingum í søgunum. T.d. plagdi eg at koyra nógv buss við ommu, tá eg var barn, og einaferð kleimdist ein kona í busshurðini (“Steðgistaðið”). Fyrsti partur av “Svart Hol” er frá, tá eg einaferð gjørdi tað liðugt við eina gentu. Frustratiónirnar hjá høvuðspersóninum í “Bókabøðil” eru nakrar, sum eg ofta havi sjálvur kent. Byrjanin í “Marrubókini” er partvíst frá, tá tað var um at gerast liðugt millum meg og eina aðra gentu, og eg hugsaði um at fara og leita eftir eini íbúð.

9. Hvør er íblásturin til "Ring boð"?

Einaferð varð eg órættvíst viðfarin av einum stjóra, og eg valdi einki at gera við tað, hóast eg bannaði nógv um tað heima og fyri vinfólki. Tað var skeivt av mær einki at gera við tað í tí løtuni - í tí støðuni. Men so fekk tað meg at hugsa um, hvussu vit føroyingar eru, tá vit eru fyri órætti. Altso vit øll somul. Og hvussu gera vit, tá politisku valdsharrarnir fremja órætt ímóti okkum. Vit gera einki, hóast vit skelda um tað. Tað er bara impotent vreiði. Kanska kemur alt tað innistongda fram sum herverk í staðin? Eg gloymi ongantíð eina dokumentarsending, sum var um føroyskan popptónleik. Har greiddu tey m.a. frá, at einaferð í 70'unum ella 80'unum stongdu myndugleikarnir eitt dansistað í Havn, og tey ungu vórðu fratør, og tey fóru oman á Vaglið og settu eld á ein bil og bardust við politiið. Eg dugi ikki at ímynda mær, at tað kundi hent í Føroyum í dag.

10. Hevur tú ein varhuga av, at fólk tulka søgurnar eins og tú?

Eg haldi, at søgur eru bara 50% lidnar, tá rithøvundin er liðugur at skriva, og søgan er komin út. Hini 50% koma upp á pláss, tá fólk lesa søgurnar. So tað at skapa søgur er ein felagsverkætlan millum høvund og lesara. Tí verða okkara tulkingar altíð eitt sindur ymiskar, eisini hóast vit lesa saman í flokkum og tulka søgur saman við einum føroysklærara.

11.Hvussu fært tú tíð at skriva?

Tað hevur altíð verið nokk so ringt at finna tíð at skriva. Serliga tí eg nú havi 5 døtur! Men seinastu tíðina havi eg gjørt tað, at eg eri farin upp kl. 5.00 um morgnarnar. So havi eg 2 tímar at skriva í, áðrenn húskið vaknar, og dagurin fer í gongd. Eg plagdi at skriva um kvøldið (og um náttina, tá eg var yngri), men tað vísir seg, at eg fái meira burturúr um morgunin. 2 tímar um morgunin svara til 5 tímar um kvøldið fyri meg. Men eg plagi at geva eitt ráð, tá fólk spyrja meg, hvussu eg fái tíð til hetta og hatta. Tað er einki, sum eitur tann rætta tíðin. Far bara og ger tað, sum tú vilt gera.

12. Hví hevur tú so stóran áhuga í persónum, sum hava sálarligt mein, t.d. Petur Oluf og Bókabøðilin?

Haldi ikki, at eg havi hugsað um teir sum persónar, ið hava sálarligt mein, hóast tað er rætt, at teir hava tað. Tað er nokk, tí eg havi áhuga í persónum, sum handla øðrvísi enn vit onnur. Persónar, sum gera okkum kløkk, tí teir fylgja ikki mynstrunum.

13. Hví kallar tú savnið eftir stuttsøguni "Glasbúrið"?

Stuttsøgan "Glasbúrið" er nokk tann "kendasta" søgan hjá mær, so tí hugsaði eg, at tað var ein fyrimunur í marknaðarføringini, at fólk kanska knýttu meg skjótari til savnið við hasum heitinum. Men tann stuttsøgan riggar kanska eisini sum symbol upp á alt savnið. Fleiri av persónunum í savninum eru stongdir í ósjónligum glasbúrum, hvør á sín egna hátt. Eg ætlaði leingi, at savnið skuldi eita *Marrubókin*. Kanska tað hevði verið betri.

14. Hvussu kann perman setast í samband við søgurnar?

Tað er danski myndprýðarin Tatiana Goldberg, sum hevur teknað forsíðumyndina. Hon hevur teknað hana út frá stuttsøguni "Marrubókin". So tekningin sigur fyrst og fremst nakað um ta søguna, men mær dámdi hana so væl, at eg valdi at hava hana á permuni á savninum. Hon er góð, haldi eg, tí hon sigur nakað um list og vald og marrur og gott og ónt.

15. Hvussu er tín skriviprosess?

Eg havi lært, at tað, sum riggar best hjá mær, er bara at fara í gongd við at skriva og ikki planleggja so nógv fyrst. Eg skal bara hava eina byrjan og so royna at fylgja við søguni. Søgan skal sjálv stýra, og so royni eg at fáa alt niður á skermin, soleiðis sum hon vil hava tað. Eg havi sagt tað onkuntíð fyrr, at mær dámar ikki at tosa um at "finna upp á" søgur, men heldur at finna søgur. Tað er eitt sindur sum arkeologi. Man skrivar bara, og so í skriviprosessini gravar mann søguna fram burturúr sínum minni, hugflogi og upplivingum. T.d. skrivaði eg "Marrubókina" út frá einum dreymi, sum eg hevði havt um ein ovurstóran saks í einum hava. "Steðgistaðið" byrjaði við eini mynd, sum eg brádliga fekk í høvdið av einum manni, sum stóð og hugdi at eini kvinnu í einum bussskýli. So eg byrji bara at skriva út frá tí. Seinni er so neyðugt at umskriva søguna. Tá veit eg nøkulunda, hvat søgan vil, og so ruddi eg upp í henni, flyti runt upp á brotini og striki eitthvørt fyri at fáa okkurt mynstur betur fram. Eg havi ofta roynt at gjørt tað øvuta, altso roynt at stýrt søguni út frá onkrari fatan, sum eg havi havt frammanundan, ella at siga, at nú vil eg skriva eina søgu um hetta og hatta, og so stríðast ímóti tí, sum søgan sjálv vil, fyri at fáa hana soleiðis, sum eg vil. Hetta riggar ongantíð, og tær søgurnar fara í skrell.

16. Hvussu langa tíð brúkar tú vanliga um eina stuttsøgu, t.d. ta fyrstu?

Tað er so ymiskt. "Glasbúrið" varð skrivað upp á eina nátt í summarferiuni ímillum 2.s og 3.s, tá eg gekk í Hoydølum. "PORN" varð skrivað upp á tveir dagar við umskrivingum. "Svart Hol" var 15 ár um at verða liðug. "Er nakar har?" tók mær eini 3 ár at skriva, og hon varð umskrivað eini 10 ferðir. Tað er skjótt at skriva eina stuttsøgu, um man heldur á, inntil hon er liðug. Tað ringasta er at fara frá henni, tí tá er tað nærum ógjørligt at koma í gongd aftur.

17. Kundi tú hugsað tær at broytt onkra søgu í savninum?

Nei, nú eri eg væl nøgdur við, at hasar søgurnar eru fluttar heimanífrá. Tær verða ikki broyttar aftur. Nú fari eg bara at hyggja frameftir til nýggjar verkætlanir.

18. Hvørja stuttsøgu ert tú mest góður við?

Eg eri rættiliga væl nøgdur við tær nýggjastu: "PORN", "Steðgistaðið" og "Er nakar har?". Men "Bókabøðil" og "Marrubókin" eru eisini á listanum.

## UMMÆLI: Glasbúrið sker ígjøgnum

### Hóast at øll síggja glasbúrið, heldur glasbúrið fram at vera fangastað hjá teimum, ið eru stødd innan veggirnar. Í nýggja stuttsøgusavninum hjá Sámali Soll verður glasbúrið latið upp fyri lesaranum. Tekstirnir eru nútíðarhóskandi og ikki kiksaðir. Teir eru djúpir, men samstundis ikki óneyðuga háfloygdir

*29. september 2015*

**Rebekka Manuela Behrens    Anna Poulsen**

Flest allir Hoydals-næmingar kenna Sámal Soll sum ensktlærara í Hoydølum, og hann skuffar heldur ikki við sínum innliti í ungdómslív. Stundum kunnu ungdómsbókmentir gerast kiksaðar og veruleikafjarar, tá tær eru skrivaðar av rithøvundum, sum vóru ungir fyri 20 árum síðani - ungdómslívið verður ofta lýst út frá tí, sum 90'ini høvdu at bjóða. Tað sæst tó týðiliga, at Sámal dagliga arbeiðir við ungum fólki, og referansurnar í bókini gerast sostatt sera nútíðarhóskandi. Í hesum stuttsøguheiminum er snildfonin uppfunnin, og internetið dúvar ikki upp á kallnetið.

Nakrar av søgunum eru langar og beinraknar, meðan aðrar eru stuttar og poetiskar. Hóast poetik, verður sex ikki lýst út frá náttúruni og eini blómu, sum er sera eyðkent fyri eldri bókmentir. Ungdómurin vil hava beinraknar og beinleiðis lýsingar av evnum, sum ikki longur eru tabu - so sum sex og samkyndleika.

Hóast føroysklærarin heilt víst kann yvirtulka savnið og finna eini túsund evni, so eru vald og harðskapur gjøgnumgangandi evni í bókini. Vald og harðskapur kann skiljast kropsliga og sálarliga. Sámal viðger serliga sálarligan harðskap og vald. Hesi evnini verða lýst við dupultmorali og ironi. Á hendan hátt gerast stuttsøgurnar spískar og samfelagsrevsandi.

Gjøgnumgangandi fyri allar stuttsøgurnar er, at tær hava ein fucked-up og avskeplaðan enda. Ein veit ongantíð, hvussu søgan lagar seg, og tað ger lesaran bundnan at lesa søguna lidna. Hetta riggar so f***ing væl.

Petur Oluf Rasmusarson Norðvík er næsta søgan í stuttsøgusavninum og inniheldur nøkur av teimum elementunum, sum eyðkenna allar søgurnar og gera bókina so feita. Her kennir uppreistrarsinnaði ungdómurin seg óivað aftur, tá Sámal skrivar um valdsmisnýtslu á politiska pallinum í Føroyum og objektifisering av kvinnukroppinum.

**Kiksað framstilling av kvinnum ella djúp ironi?**

At eitt mannfólk hevur skrivað savnið, er eingin ivi um. Tað eru nógvar - fyri ikki at siga ríkiligt - av seksuellum referansum til gentur og kvinnur. Tað kemur fleiri ferðir fyri, at talan er um eina lekkra gentu, sum hevur góðar boppur og pornoreyv, sum frásøgufólkið sjálvt tekur til. Stundum kann hetta tykjast kiksað - ella sum um, at ein hormonbumbaður tannáringur hevur fest sínar seksuellu dreymar niður á pappír. Hetta sæst serliga aftur í stuttsøguni Leygarkvøld, har ein "lekkur" genta fer yvir til ein kiksaðan drong og "out of no where" spyr hann, um tey skulu fara at mogga.

Á hinum bógnum kann talan eisini vera um ein ironiskan undirtóna, har Sámal vísir á, hvussu óhoyrt tað nevniliga er, at ein genta hevur hendan framferðarháttin. Tí vanligt hoyrir ein um, at ein drongur ber seg at á henda hátt. Lesarin gerst óivað kløkkur ella nærmast provokeraður, tá gentan vísir so erliga á sín seksuella tørv.

Hesi omanfyri standandi útsøgn stuðlar stuttsøgan Petur Oluf Rasmusarson Norðvík undir. Søgan snýr seg um ein konservativan politikara, ið eitur Petur Oluf. Hann livir eitt trivielt lív, tó so - tann heldur eldri politikarin sneytar ofta eftir ungum, lekkrum gentum. Hann tekur myndir av ungu gentunum, uttan at tær vita av. Handan fasaduna er hann ein vanligur, konservativur maður, men inni í skrivstovu síni í Løgtinginum situr hann og fleygar sær til myndirnar av ungu gentunum, sum allar hava eitt sokallað "kom-og-mogga-bros". Heldur ikki er tað tilvildarligt, at Sámal dregur Løgtingið uppí, tí lesarin fær nevnliga ein smakk av rotinskapinum, sum krógvar seg handan vald og prestisju.

Politiið hevur frænir av honum, og søgan endar við, at maðurin so líðandi umskapast til eina prostitueraða kvinnu. Óviljað spyr hon dreingir á gøtuni, um teir tíma at mogga. Petur Oluf upplivir soleiðis hansara egnu objektifisering á egnan kropp. Tað óætlaða "kom-og-mogga-brosið" gerst nú ein sonn marra hjá Petur Oluf Rasmussen Norðvík.

Aftur her traðkar ironiin í karakter, og Sámal vísir á trupulleikan av objektifiseraðu kvinnumyndini í nútímans samfelagnum. Soleiðis kann kiksaða framstillanin av kvinnuni skiljast sum djúp ironi, heldur enn at Sámal hevur misfatað tankagongdina hjá kvinnuni. Sum lesarar velja vit at síggja stuttsøguna sum samfelagskritikk, heldur enn eina kiksaða avmynd av kvinnu-seksualitetinum.

**Frá 1900-og-grøntkál aftur til 2015**

Stuttsøgurnar Fríggjakvøld, Leygarkvøld og 10 ára broytingin lýsa nógv ungdómsmentanina anno 2015. Endiliga sleppa vit undan at hoyra um drong, ið hevur ligið við gentu og síðani fest hana sum frúgv. Somuleiðis fara tey ungu heldur ikki í dans at lurta eftir disko frá 80'unum. Nú hoyra vit veruliga um, hvussu ungdómslívið er anno 2015, sum eisini, umframt dans, inniber ov nógv rúsdrekka, spýggj og politiið.

Stuttsøgan Fríggjakvøld lýsir sera beinrakið, hvussu eitt fríggjakvøld hjá einum kiksaðum dreingi háttar seg. Stuttsøgan fylgir einum ungum dreingi, ið situr einsamallur eitt heilt kvøld á eini barr og drekkur seg skít. So líðandi á kvøldinum prátar hann við barrvørin og eygleiðir eitt yndigt par á dansikvøldinum. Kvøldið endar við, at hann dettur av á vesinum saman við sínum spýggi. Tað endar við, at hann gongur oman í Steinatún, har hann eisini dettur av. Politiið finnur dreingin og koyrir hann heim til mammuna, har hon tekur ímóti honum. Orsaka, er tað einasta, drongurin fær sagt.

Hendan søgan er beinrakin og einføld. Tað eru óivað nógvir ungdómar, ið ávikavist kenna seg aftur í hesum ella vita um onkran annan, ið hevur upplivað hetta.

Tann feitasta søgan er óivað 10 ára broytingin, ið snýr seg um eitt fyrrverandi par, ið møtist aftur eftir 10 ár. Kvinnan sigur síðani, at hon ynskir, at hon og maðurin skulu koma saman aftur, men tað ynskir hann ikki. Tað vísir seg seinni, at hann er samkyndur. Samkyndleiki er jú eitt evni, ið fyllir nógv á almenna kjakpallinum í Føroyum, meðan tað fyrr var heldur viðbrekið og tabu.

**Ungdómurin ikki undirmettur**

Stuttsøgurnar Marrubókin, Glasbúrið, Bókabøðil og Er nakar har? hava allar til felags, at tær eru daprar og óhugnaligar. Nógvur harðskapur - bæði sálarliga og kropsliga - fer fram. Her er tað serliga, at Sámal skrivar um sálarlívið hjá menniskjanum, og hvussu menniskjað kann verða fangað í sínum egna høvdi. Hetta eru tær stuttsøgurnar, ið eru væl djúpari enn aðrar í savninum. Hetta vísir eisini á, at Sámal ikki undirmetir ungdómin, samstundis sum stuttsøgurnar ikki eru óneyðuga háfloygdar. Her verður lesarin bjóðaður av og sleppur at kanna sítt abstraktións-støði.

**Eitt veruligt svart hol í savninum**

Afturvið rósum kasta vit eisini rís. Stuttsøgan Svart Hol er veruliga eitt svart hol í savninum. Hon er langdrigin og tykist at vera ífyll í savninum. Ikki tað, sum lesari skilir ein boðskapin hjá Sámali um svarta holið við rúsdrekkamentanini og hinum reservaða føroyinginum, sum ikki hevur samband við sínar kenslur. Stuttsøgan er tó alt ov langdrigin og hevur einki hæddarpunkt.

Aftur her kann langdrigna søgan avspegla langa og innihaldsleysa lívið hjá høvuðspersóninum, men søgan er óneyðug og kundi hetta evnið verið lýst heldur betri.

Aftrat hesum tykist tað sjálvfeitt, tá Sámal nevnir sítt egna navn í ymsum samanhangum, so sum at onkur persónur eitur í Sámalstovu. Droppa tað - tað kiksar.

**Ikki ov yvirflafiskt ella óneyðuga cheesy**

Stuttsøgusavnið er eitt nýbrot í føroyskum skaldskapi, tá talan er um skaldskap til ung. Hetta stuttsøgusavnið riggar. Tað er ikki ov yvirflatiskt ella óneyðuga "cheesy". Eisini dregur hann nútímans viðurskiftir inn, sum tú eisini lesur í enskum og donskum skaldskapi, men tó er tað serligt, at vit ungu kunnu lesa hetta, har vit samstundis hoyra um føroysk staðarnøvn.

Eisini skal Sámal Soll eiga rós fyri dirvið at skriva yvirdrivið. Føroyskur skaldskapur til ung er ofta undirdrivin við nógvum abstraktum lýsingum. Sámal torir at kalla ein harðan murt fyri ein harðan murt og skriva um blóðutar fucked-up hendingar.

Savnið er djúpt og modernað. Sámal missir ikki tráðin, tá hann skrivar um yvirflatiskar ungdómstrupulleikar. Hann undirmetir ikki ungdómin, og tað er gleðiligt.

*Glasbúrið fær tískil 5 út av 6 R'um*

**KELDA:** Røddin: http://kvf.fo/roddin/greinar/2015/09/29/ummaeli-glasburid-sker-igjognum

## Um rithøvundin



Sámal Soll er føddur 25. juni í 1977 sum Sámal Kristian Jacobsen í Havn. Hann er rithøvundur, lærari og fyrrverandi formaður í Rithøvundafelag Føroya. Hann er útbúgvin cand. mag. í enskum máli og bókmentum frá universitetinum í Aalborg og fekk í 2017 prógv í føroyskum sum hjánámi á Fróðskaparsetri Føroya. Hann er elstur av 7 systkjum, vaks upp við Oyggjarvegin í Havn og flutti við familjuni til Hoyvíkar at búgva í 1984 og fór at ganga í Hoyvíkar skúla. Hann fór á studentaskúlan í Hoydølum, har hann tók prógv í 1997. Síðan fór hann niður til Aalborg at lesa enskt. Hann tók BA prógv í enskum í 2001, og cand. mag. í enskum í 2004. Í 2007 fekk hann arbeiði í Føroya Banka sum samskiftisfólk og starvaðist har til 2011. Síðani 2007 hevur hann undirvíst parttíð í enskum í Hoydølum, men fór at undirvísa fulla tíð í 2011. Hann hevur eisini undirvíst eitt ár á Tekniska skúla í Havn.

Tær fyrstu stuttsøgurnar skrivaði hann, meðan hann gekk í Hoydølum. Í 2005 varð søgan "Ver ikki bangin" vald sum onnur vinnarasøgan í stuttsøgukapping, sum Bókadeildin skrivaði út. Árið eftir varð søgan givin út í søgusavni á 7 málum umframt føroyskum. Hann hevði tríggjar stuttsøgur við í savninum *Russiskur dansur*, sum Dimmalætting gav út í 2001 og hevur týtt stuttsøgur úr enskum, eftir m.a. Ernest Hemingway og Stephen King, sum hava staðið í Vencili og Varðanum. Hann týðir gátubøkurnar í røðini *Detektivstovan hjá Lassa og Maiu*, sum Bókadeildin gevur út.

Í 2015 gav hann út stuttsøgusavnið *Glasbúrið*, ið er eitt savn við 19 stuttsøgum. Forlagið Sprotin gav út.

**Leinki:**

Almenna heimasíðan
https://samalsoll.wordpress.com/
Wikipedia:
https://fo.wikipedia.org/wiki/S%C3%A1mal_Soll
https://da.wikipedia.org/wiki/S%C3%A1mal_Soll
Instagram:
https://www.instagram.com/samalsoll/

Rithøvundafelagið: http://www.rit.fo/
(trýst á "limir")
Facebook:
https://www.facebook.com/samalsoll &
https://www.facebook.com/samalsollwriter/
Tumblr: http://samalsoll.tumblr.com/

Teldupostur: samalsoll@gmail.com



**SÁMAL SOLL**

# GLASBÚRIÐ

**– 19 STUTTSØGUR**